FORELDUR OG LESANDI

# At vera lesandi og foreldur



Winther Poulsen

andi í
mannhavn

Journalistik og
kifti, Roskilde
ersitet

Eg eiti Ruth, og eg lesi Journalistik og samskifti á Roskilde Universiteti. Umframt at vera lesandi, eri eg eisini mamma at Braga, sum er tvey ár, og Onnu Katrinu, sum er null. Í løtuni eri eg í barsli, men tá eg byrji aftur aftaná summarfritíðina, fari eg í holt við kandidatin. Saman við manni og børnum búgvi eg í Valby í Keypmannahavn.

## „GOTT AT FÁA SÆR BØRN, MEÐAN MAN LESUR"

Áðrenn eg bleiv mamma, hoyrdi eg mangan frá teimum eldru og kønu, at tað er gott at fáa sær børn, meðan man er lesandi, serliga tí at tá hevur man so góða tíð til tey. Hetta er rætt, men tað at eiga børn, meðan man er lesandi, hevur bæði góðar og ringar síður.

## GÓÐAR UMSTØÐUR AT HEINTA OG VERA HEIMA

Eitt stórt pluss við at eiga børn, meðan man er lesandi, eru umstøðurnar at vera heima saman við børnunum og at heinta tey tíðliga frá stovnunum. Tá ið tað ikki er sama eftirlit við tær sum lesandi, og tíðirnar mangan eru skiftandi, er tað lætt at koyra børnini eitt sindur seinni á stovn um morgnarnar og at heinta tey tíðliga. Og tá børnini eru sjúk (sum hendir ofta), er tað ikki neyðugt at biða nakran arbeiðsgevara um frí fyri at kunna vera heima saman við børnunum, og hetta er eitt stórt pluss. Samstundis kunnu børnini eisini hava eins langar frítíð og universitetini. Tú hevur samanumtikið størri frihelt, tá tú ert lesandi. Tá tað er sagt, skal tað leggjast aftrat, at tað krevur nógv disiplin at vera lesandi og eiga børn, tí tímarnir, tú velur at vera heima saman við børnunum, aloftast skulu lesast inn aftur í hinum endanum.

## PLANLEGGING ER VEGURIN

At hava børn, meðan man er lesandi, er til tíðir sera hart, serliga um man ikki er í Føroyum og hevur ommur og abbar beint við. Samstundis eru tað tíðir, tá lesnaðurin krevur nógv, og man verður noyddur at sita við lektium til seint útá kvøldið, tá børnini eru farin í song. Tó ber alt til við góðari planlegging. Planlegging er vegurin, tá royndir o.a. bankar uppá, samstundis sum børnini krevja sítt. Tíbetur duga eg og maðurin væl at skipa okkum, so tað altíð er tíð til lektiur og uppgávuskriving, tá tað skal til.

## SAMFELAGIÐ ER GÓÐUR STUÐUL

Nú búgva vit í Danmark, og her er nógvur og góður stuðul at heinta. Umframt at fáa SU í eitt heilt ár, tá man er í barsli, fær man eisini stuðul til húsaleiguna og stuðul til vøggustovugjald. Harafturat fær maðurin barsil, so tað ger tað lætt hjá okkum báðum at vera so nógv sum møguligt saman við børnunum.

Peningastuðulin er eitt, men nakað, sum er saknað nógv, tá man sum familja býr í útlegd, eru ommur og abbar. Børnini sakna tey, men tað gera vit foreldur so bestemt eisini. Eitt nú um børnini eru sjúk, ella um bæði foreldrini eru boðin út, so hevði tað verið gott við barnagentu. Tíbetur býr systir mín eisini í Keypmannahavn, og hon er góð at heita á, um tørvur er á hjálp.

### *VEITINGAR TIL UPPIHALDARAR Í FØROYUM*

**Studningur frá Studna (hægri lestur)**
kr. 4.315,- pr. mðr. skattafrítt

**Lán frá Studna**
kr. 2.419 pr. mðr.

**Barnastudningur frá Studna**
kr. 1.000,- pr. mðr pr. barn

**Barnafrádráttur í skattinum**
– ymiskt frá kommunu til kommunu, t.d. 5.500,- í Klaksvík og kr 8.000,- í Tórshavn. Hetta er pr. barn um árið.

**Í landsskattinum er barnafrádrátturin**
kr. 9.200,- fyri børn millum 0-6 ár og kr. 6.500,- fyri børn 7-17 ár.

### AFTURAT HESUM ERU VEITINGAR FYRI STAKAR UPPIHALDARAR

**Studningur frá Studna til einsamallar uppihaldarar**
kr. 1.538,- pr mðr. bara eina ferð óansæð tal av børnum.

**Serligt barnaískoyti útgoldið av Almannaverkinum**
kr. 2.500,- pr. barn pr. ársfj.

**Barnagjald, sum pápin skal rinda**
kr. 1.083,- pr. barn/mðr.



### *VEITINGAR TIL UPPIHALDARAR Í DANMARK*

**SU**
kr. 6.015,- skattskyldugt

**„SU-forsørgertillæg", um tú býrt saman við einum SU-móttakara**
kr. 2.403,- pr. mðr.

**SU lán**
kr. 3.078 pr. mðr.

**Supplerandi forsyrgjara SU lán**
kr. 1540

**„Børne- og ungeydelse" útgoldið frá Udbetaling Danmark**
0 – 2 ár: 4.491 kr. pr barn/ársfj.
3 – 6 ár: 3.555 kr. pr. barn/ársfj.
7 – 14 ár: 2.796 kr. pr. barn/ársfj.
15 – 17 ár: 932 kr. pr. barn/mðr.

### VEITINGAR AFTURAT TIL STAKAR UPPIHALDARAR

**„Forsørgertillæg" frá SU**
kr. 6.015,- pr. mðr.

**„Ordinært børnetilskud" – Udbetaling Danmark**
kr. 1.385,- pr. barn/ársfj.
„Ekstra børnetilskud"
kr. 1.412,- pr. ársfj. bara einaferð

**„Børnebidrag" frá barnapápanum**
kr. 1.333,- pr. barn/mðr.

Møguleiki er eisini at søkja um „Særligt børnetilskud til uddannelsessøgende forældre". Ískoytið verður roknað eftir inntøku og er í mesta lagi kr. 7.276 kr. árliga. Kr. 1819,- pr. ársfj.

**NB! Tað kann ikki veitast, um tað verður útgoldið „forsørgertillæg" frá SU.**

Harafturat kemur møguleikin at søkja um „boligstøtte". Upphæddin verður roknað eftir støðd á íbúð, tal íbúgvum, inntøku og tal á børnum.

**G.G. tað er møguligt at søkja endalán, um ein skuldi veri so óheldigur, at SU klippini ikki røkka**

**Endalán í Føroyum í 11. mðr.**
kr. 6.734,-

**Endalán í Danmark**
kr. 7.940,-